


Nýggja katalogið er komið
fæst á hesum støðum:

friendtex

Hanna
Undir Fossum 46
700 Klaksvík
Tel. 456827
opið: mán-frí 17-19 • ley 10-14
annars eftir avtalu tel. 216827

Marjun
Rættarvegur 2
420 Hósvík
Tel. 422 772 • Fartel. 268 052
opið: mán-frí 16-19
annars eftir avtalu


# Atlantsflog nú umboð í Bretlandi og Írlandi

*Tá var á stevnu í Reykjavík, nevnd »Midatlantic Seminar & Workshop«., at Atlantsflog og Icelandair gjørdu avtalu um samstarvið at umboða Atlantsflog í Bretlandi og í Írlandi*



**Atlantsflog hevur gjørt avtalu við Icelandair um, at íslendska felagið skal umboða føroyska flogfelagið í Stórabretlandi og í Írlandi**

FLOGFERÐIR
*Eirikur Lindenskov*

Atlantsflog hevur gjørt avtalu við Icelandair um, at teirra felag í London skal umboða Atlantsflog í Stórabretlandi og í Írlandi.

Hendan avtalan varð gjørd í Reykjavík mánadagin, tá Atlantsflog var á stevnu í Reykjavík, nevnd »Midatlantic Seminar & Workshop«.

Skrivstovan hjá Icelandair í London skal hjálpa kundum hjá Atlantsflog við flogferðaseðlum, pakkaferðum eins og við góðum ráðum um Føroyar.

– Fyri at tryggja, at skrivstovan í London hevur neyðuga kunnleikan um Føroyar, hava fleiri av starvsfólkunum á skrivstovuni í London longu verið í Føroyum, og fleiri eru á veg, sigur Kent L. Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantsflog.

Í sambandi við umboðanina hjá Atlantsflog í London er sett á stovn ein serlig telefonlinja til Atlantsflog. Nummarið er +44 (0) 870 443 2372.

Atlantsflog hevur stórar vónir til hetta samstarv, tí Icelandair hevur gott og breitt samband til ferðastovur í Bretlandi og í Írlandi. Har eru fleiri enn 4.700 slíkar stovur, sum við hesum tiltakið fáa kunnleika um Føroyar og um møguleikarnar um Føroyar sum ferðamál.





Glasstovan søkir eftir einum tænaralærlingi at byrja skjótast tilber.

**Útbúgvingin**
Vit bjóða tær eina útbúgving, ið tekur 3 ár og 4 mánaðir, har lærutíðin umfatar starvsvenjing í Glasstovuni á Hotel Føroyum og skúlagongd á tekniskum skúla í Danmark.

Tú kemur at starvast saman við einum ungum liði í einum umhvørvi har tað hendir nakað. Sum lærlingur í einum altjóða hotelli fært tú nógvar avbjóðingar.

**Tann rætti lærlingurin**
Hevur tú áhuga fyri ferða - og tænastuvinnuni, hevur tú nú møguleikan fyri einum læruplássi. Vit vænta, at tú ert smílandi, ágrýtin, fyrikomandi og løtt/lættur av lyndi.

**Vit bjóða**
Verður tú tænaralærlingur á Hotel Føroyum, lova vit tær eina fjøltáttaða útbúgving og hollar royndir, sum tú kanst brúka víðari á tíni ferð gjøgnum lívið.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til yvirtænararnar Tummas Láadal ella Peter Hentze á 31 75 00.

Umsóknir skulu sendast til:

*Hotel Føroyar P/F*
*Postsmoga 3303*
*110 Tórshavn*

Umsóknir skulu verða okkum í hendi innan 1. mars 2003

petur & petur • 320870

GLASSTOVAN
*The Favourite Restaurant*

*Glasstovan er matstovan á Hotel Føroyum. Hotel Føroyar er eitt altjóða hotel við 4 stjørnum, sum verður rikið sum sjálvstøðugt partafelag í Smyril Line samtakinum. Hotellið er tað størsta í Føroyum við 216 seingjarplássum. Alt árið er Hotel Føroyar ein miðdepil fyri fundar- og skeiðvirksemi, eitt hotel fyri handilsfólk og ítróttarfólk. Um summarið virkar hotellið eisini sum frítíðarhotel. Í løtuni starvast 50 fólk á Hotel Føroyum.*



NÝGGJUR JEEPUR Í FØROYUM



REXTON RX290

TURBO DIESEL VØRUBILUR
frá kr. 269.259,- u/mvg

TURBO DIESEL PERSÓNBILUR
frá kr. 359.870,- u/mvg

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tlf 31 10 13 · Boks 3262 · FO-110 Tórshavn






*Í gjár sang Eivør beinleiðis í íslendska Ríkisútvarpinum*

*Mynd: Jimmy Smart*

# Eivør verður landskend í Íslandi

**Eivør Pálsdóttir hevur nógv um at vera, men hon ætlar sær at luttaka í íslendska Grand Prixnum við heilum hjarta. Hon roknar tó ikki við at vinna**

GRAND PRIX
*Eyðun Klakstein*

Leygarkvøldið fer Eivør Pálsdóttir at syngja í íslendska Grand Prixnum, men hetta er bara ein av mongu spennandi uppgávunum, sum bíða eftir songfuglinum úr Gøtu. Hon hevur nógv um at vera, og áðrenn Grand Prixið hevur nógv verið á skránni.

- Eg haldi, at Grand Prixið hevur fylt minst av øllum, síðani eg kom her yvir fyri eini viku síðani, sigur Sædis Eilifsdóttir, mamma Eivør. Hon er er farin til Íslands at fylgja dóttrini, nú hon verður við í Grand Prixnum.

- Hetta var eitt gott høvi at fara yvir at vitja Eivør og síggja, hvussu hon býr, hvar hon spælir og hvørji fólk, hon arbeiðir saman við, sigur Sædis.

## Ongar vónir um at vinna

Hóskvøldið spældi Eivør á eini konsert í Reykjavík, har eisini Bubbi Mortens og onnur vóru við. Í gjár skuldi Eivør í íslendska útvarpið at syngja beinleiðs. Og longri frammi í tíðini bíða konsertir, upptøkur og ferðir.

- Grand Prixið hevur ikki meira enn eitt vist at týða hjá mær, men eg taki allar uppgávur seriøst, og eg ælti mær at gera mítt allarbesta til Grand Prixið. Eg gleði meg til at sleppa at syngja leygarkvøldið, sigur Eivør Pálsdóttir.

- Eg havi tó ongar vónir um at vinna, tí fyri tað fyrsta er sangurin hjá mær ikki ein typiskur vinnari, og fyri tað næsta er tað óhugsandi, at íslendingar fara at senda ein føroying at umboða seg í altjóða Grand Prixnum.

## Glað fyri møguleikan

Tað er eingin, sum ivast í, at Eivør kann fáa nógv burtur úr luttøkuni í Grand Prixnum. Hon verður kend um alt Ísland, og tað kann loysa seg í longdini.

- Eg havi ongantíð hildið so nógv um Grand Prixið, men eg eri sera glað fyri, at eg havi fingið møguleikan at vera við, sigur Eivør.

Tað er umvegis íslendska bólk sín, at Eivør fekk gylta møguleikan. Hesin bólkurin ætlar sær at fara í studio seinni í ár, og tey skulu eisini á konsertferð í Norðurlondum.

Men fyrst er tað Grand Prixið, og í gjár ætlaði Eivør at fara undir seinastu fyrireikingarnar til framførsluna. Leygardagin verður ljóðroynd, og leygarkvøldið eftir klokkan 21.00 er tað álvari.

15 sangir eru við í Grand Prixnum hesaferð, og talan er um ymisk tónleikasløg. Sangirnir eru meira fjølbroyttir enn vanligt, og tað hevur eisini givið pláss fyri rocktónleiki, jazzi og punk.

Eivør skal í ein súreplagrønan kjóla, og hetta er ein kjóli, sum hon sjálvur hevur teknað. Seymingin er farin fram á eini seymistovu í íslendska høvuðsstaðnum.

## Familjan á flog

Eivør fer neyvan at kenna seg einsamalla í Háskólabíó-høllini leygarkvøldið, tí familjan hjá henni er farin til Íslands at fylgja við, og tey ætla at stuðla skyldkonuni.

- Eg haldi, at Eivør er fegin um, at so nógv koma yvir at fylja henni, sigur mamman, sum sjálv hevur verið í Reykjavík seinastu vikuna.

Sjónvarp Føroya sendir Grand Prixið beinleiðis leygarkvøldið.

Sosialurin hevur eisini sent fólk til Reykjavíkar at fylgja luttøkuni hjá Eivør, og á portal.fo ber til at fylgja við og síggja myndir longu í kvøld. Í blaðnum týsdagin ber til at lesa greinar og síggja myndir úr Íslandi.

# Starvsfólk í øðini um setan

**Starvsfólk á Fornminnissavninum vilja hava setanina av nýggjum landsantikvari gjørda til einkis**

SETAN
*Heri á Rógvi*

Løgmaður, sum hevur havt trupult við at fáa tilfar um setanina av nýggjum landsantikvari frá Mentamálaráðnum, hevur nú fingið eitt skriv frá starvsfólkunum á Føroya Fornminnissavni.

Starvsfólk á Fornminnissavninum vilja hava setanina av nýggjum landsantikvari gjørda til einkis.

Í skrivinum, undirskrivað av ellivu starvsfólkum, sum eru øll tey í føstum starvi umframt Símun V. Arge og Andras Mortensen, verður funnist hvassliga at mannagongdini og ikki minst eftir Annlis Bjarkhamar.

– Vit mótmæla, at tað umboð, vit eftir boðum myndugleikana og í samsvari við almenna setanarpolitikkin hava valt í setanarnevndina, av landsstýrismanninum uttan grundgeving verður mett ikki at gera arbeiði sítt nóg væl og straks gerst offur fyri almennari útspilling.

Vit mótmæla, at landsstýrismaðurin sjálvur átekur sær at taka dagar ímillum, hvør hevur størsta fakliga og fyrisitingarliga førleika at stýra stovninum, skriva tey m.a. í skrivinum til løgmann.

Samstarv og sínámillum virðing millum stovnsleiðara og starvsfólk eru avgerandi fyri sálarliga arbeiðsumhvørvið. Tað er øll orsøk at stúra fyri arbeiðsumhvørvinum, um politiskt settur stovnsleiðari veruliga fær loyvi at taka við leiðsluni av Føroya Fornminnissavni. Tann skaði, sum longu er hendur við tí persónliga ágangi, sum starvsfólkum hava verið fyri, er nóg álvarsligur.–, siga starvsfólk á Føroya Fornminnissavni.